# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit og skotar hava so nógv felags, at tað tænir hvørgum okkara at kvetta bandið*

*Gordon Brown*

# Grikkar skelkaðir av morðum



Fimm ungir veiðimenn eru funnir myrdir har norðuri í landinum. Løgreglan hevur illgruna um, at teir sóu okkurt, sum ikki tolir dagsins ljós.

Tveir av teimum myrdu monnunum vóru brøður, og hinir tríggir vóru systkinabørn teirra. Allir vóru millum 17 og 33 ár. Teir vóru farnir á veiðiferð í einum øki einar 300 kilometrar í útnyrðing úr Athen, men leygarkvøldið vórðu teir funnir skotnir.

Grikska løgreglan sigur, at fýra av líkunum lógu á sama staði, meðan líkið av tí 17 ára gamla Alex Nikolopoulos lá einar 100 metrar frá hinum. Byrsurnar, sum teir høvdu havt við sær, lógu hjá líkunum.

Løgreglan sigur, at tann 17 ára gamli hevði ringt til pápa sín leygardagin við fartelefonini, men at samrøðan bleiv avbrotin. Tað var eisini pápi Alex Nikolopoulos, sum fann líkini av teimum fimm monnunum.

- Allir vórðu skotnir, og tað er eingin ivi um, at tann ella teir, sum skutu, skutu fyri at drepa menninar. Hendan brotsgerðin er tann fyrsta av sínum slagi í Grikkalandi. Eg havi ongantíð sæð nakað slíkt fyrr, sigur løgregluovastin Vassilis Tsiatouras.

Løgreglan kann nú málið, men viðgongur, at hon hevur eingi spor at ganga eftir. Ein møguleiki er, at teir fimm menninir hava verið vitni til eitt ella annað, sum ikki tolir dagsins ljós, og at teir vórðu fyribeindir.

- Eg havi ongantíð sæð nakað slíkt, sigur grikski løgregluovastin.

## Ísrael legði landminur í Libanon

Minuserfrøðingar hjá ST-hermonnunum í Libanon hava staðfest, at Ísrael brúkti landminur í krígnum har í summar.

Líka síðani kríggið millum Ísrael og Hizbollah hava libanar hildið uppá, at ísraelski herurin brúkti landminur, og nú siga ST-hermenninir í Libanon, at tað var so.

Fríggjadagin í síðstu viku brast ein landmina, og tveir evropeiskir minuserfrøðingar og ein libanskur lækni vórðu særdir. Ein talsmaður hjá ST-hermonnunum segði seinni, at talan var um eina landminu, sum ísraelski herurin hevði lagt har undir bardøgunum í summar.

- Hetta er tað fyrsta prógvið, sum vísir, at ísraelski herurin legði landminur í Suðurlibanon í ár, segði ST-talsmaðurin.

Ísraelskar hernaðarkeldur hava ikki avsannað tíðindini, men ein ónevndur ísraelskur heryvirmaður segði við AP um vikuskiftið, at tað kunnu vera Hizbollah-menn, sum løgdu minuna, og harafturat kann tað hugsast, at hon hevur ligið har í fleiri ár.

## Bæði onglendingar og skotar vilja hava loysing

**Bæði í Onglandi og Skotlandi er meiriluti fyri, at Skotland og Ongland fara hvør til sítt**

Um nakrar mánaðir eru 300 ár liðin, síðani Ongland og Skotland vórðu skipað sum ein eind, men fáa onglendingar og skotar sín vilja, fær eindin ikki mong ár afturat. Tá kann Bretland fara í søguna sum Jugoslavia á sinni.

Í hvussu er vísir ein nýggj meiningakanning hjá blaðnum The Sunday Telegraph, at 52 prosent av skotska fólkinum taka undir við, at Skotland verður loyst frá hinum partinum av Bretlandi. Í Onglandi hava uppaftur fleiri somu áskoðan, tí har siga 59 prosent av teimum spurdu, at tey taka undir við, at Skotland verður sjálvsstøðugt ríki. Sama kanning vísir, at næstan tveir triðingar av onglendingunum halda, at Ongland eigur at hava sítt egna parlament.

Sambært The Sunday Telegraph kemur úrslitið óvart á mong, og blaðið heldur, at kanningin kemur skotska tjóðskaparflokkinum SNP væl við undan skotska parlamentsvalinum næsta ár. SNP er fyri at loysa Skotland frá Onglandi.

The Sunday Telegraph heldur, at loysingarhugurin hjá onglendingum og skotum kann gerast ein avbjóðing fyri Gordon Brown, sum eftir øllum at døma skal taka við eftir Tony Blair.

- Hugsa vit um, hvat bindur okkum saman so sum ættarbond, búskaparliga sambandið, okkara felags virði og tey søguligu bondini, so vænti eg, at fólk fara at skilja, at vit standa sterkari sum ein eind heldur enn at fara hvø til sítt, sigur Gordon Brown við blaðið.

STUTT SAGT

### Blaðstjóri í fongsul

Í Jemn hevur blaðstjórin Kamal al-Olufi fingið eitt árs fongsul, tí blað hansara setti eina av teimum nógv umstríddu Muhammed-tekningunum hjá JyllandsPostinum á sína heimasíðu. Blaðstjórin valdi seinni at skriva eina grein, har hann vardi profetin, men tað hevði eftir øllum at døma onga ávirkan á dómararnar í rættinum. Umframt dómin ímóti blaðstjóranum gjørdi rætturin av, at blaðið skal ikki koma út teir næstu seks mánaðarnar, og bæði blaðstjórin og útgevarin fingu bót. Leygardagin gingu jemenskir tíðindamenn mótmælisgongu ímóti dóminum, sum eisini er kærdur fyri ein hægri rætt.

### Minnis-konsert

Bretsku prinsarnir Wlliam og Harry, sum eru synir Charles prins og Dianu prinsessu, hava gjørt av at skipa fyri einari konsert til minnis um mammuna. Konsertin verður á Wembley Stadium í London tann 1. juli næsta ár, tí tann dagin hevði Diana prinsessa fylt 45 ár. Diana doyði í einari ferðsluvanlukku í París tann 31. august í 1997, tá bilførarin hjá henni og vinmanni hennara royndi at koyra undan einum myndamanni. Bilurin rendi á ein stólpa, og bæði Diana og vinmaður hennara doyðu. Kanningar vístu, at bilførarin var drukkin.

### Gekk nakin í svøvni

Klokkan hálvgum sjey leygarmorgunin ringdi ein maður í Asker í Noregi til løgregluna og boðaði frá, at ein nakin maður stóð í gongini. Løgreglan sigur við blaðið Budstikka, at tann nakni maðurin var líka ovfarin sum tann, ið ringdi til løgregluna. Hann dugdi ikki at greiða frá, hví hann var farin inn til hin mannin, og hann visti heldur ikki, hví hann gekk nakin úti og mól. Niðurstøðan hjá løgregluni bleiv tí, at maðurin hevði gingið í svøvni.